## Skulu marknaðarføra tosk

Í Noregi hevur fiskivinnan gjørt av at brúka 20 milliónir krónur til at marknaðarføra tosk. 11,5 milliónir krónur koma frá tí almenna sum stuðul, og hitt rinda Útflutningsnevndin og sølufeløgini. Útflutningsnevndin ætlar at skipa fyri marknaðarfremjandi átøkum ymsastaðni í Evropa, og millum annað verður hugsað um at økja áhugan fyri klippfiski í Portugal. Harumframt er ætlanin at elva til størri áhuga fyri feskum og frystum toski í Fraklandi, Spania, Svøríki og heima í Noregi, skrivar Nordlys.



## Eingin lodnuveiða enn

Íslendsk skip sleppa ikki at fiska lodnu enn. Havrannsóknarskipið Árni Friðriksson hevur jús verið og leitað eftirm lodnu, men sambært stjóranum á havrannsóknarstovuni, Jóhann Sigurjónssyni, er ikki grundarlag fyri at loyva skipunum út enn. Tað heldur skiparin á Lundey vera burturvið. Við Morgunblaðið sigur hann, at teir komu fram á eina sera stóra lodnutorvu á Suðurlandinum sunnudagin. Torvan var 14 fjórðingar long og millum 600 og 1.000 metrar freið, sigur hann.

# Nýtt oljufelag við í leitingina við Føroyar

**Sjeyndi brunnurin dregur nú nýggj oljufeløg til Føroya. Komandi boringin á Anne Marie leiðini á landgrunninum tykist at hava stóran áhuga millum oljufeløg. Herfyri bankaði eitt japanskt oljufelag á dyrnar og nú hevur so eitt enskt oljufelag keypt seg inn í komandi boring á Føroyaleiðini, har italska ENI er fyristøðufelag og føroyska Faroe Petroleum er týðandi partnari**



*West Phoenix, sum skal bora Anne Marie í summar*

SJEYNDI BRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Talan er um bretska oljufelagið DANA, sum er eitt av teimum meðalstóru oljufeløgunum, sum hevur havt eydnuna við sær við at raðfesta og keypa seg inn í leitiloyvi, sum eiga góðar møguleikar at goyma olju og gass. DANA og Faroe Petroleum hava havt eitt gott samstarv í mong ár. Nú fara hesi bæði oljufeløgini inn í eitt ítøkiligt samstarv við boring fyri eygað.

Sosialurin hevur spurt Graham Stewart, stjóra í Faroe Petroleum, hvat hann hevur at siga til, at DANA nú er partur av boringini av Anne Marie brunninum.

– Vit halda sjálvi, at Anne Marie brunnurin er áhugaverdur, og tann sannroynd, at Dana nú hevur gjørt av at vera partur av hesi boriverkætlan, vísir, at teimum eisini dáma væl loyvi 005.

Dana hevur keypt burtur av partinum hjá ENI, sum er fyristøðufelag. Helst verður parturin hjá Dana 40%. ENI, sum hevði 75%, fer eftir hetta at standa fyri 35%, meðan Faroe Petroleum og japanska Cieco hava 12,5% hvør. Tað var japanska felagið, sum keypti helvtina av partinum hjá Faroe Petroleum, sum upprunaliga hevði 25%. Afturfyri hevur Cieco átikið sær at gjalda kostnaðirnar í sambandi við boringina hjá føroyska felagnum.

Faroe Petroleum luttekur annars í tveimum leitiloyvum saman við Dana, einum vestan fyri Hetland, sum verður borað í summar og einum í Noregi.

Á heimasíðuni hjá Dana stendur m.a.:

"Other growth in 2008 included Dana farming into the SE July concession in Egypt; into Licence 005 in the Faroe Islands which contains the Anne Marie prospect; into UKCS Southern North Sea Block 48/1a where Dana will earn a 40% interest; as well as a multi-block swap in Norway with Det Norske Oljsekap. Each of these commercial transactions has enhanced Dana's asset portfolio and delivered some exciting short-term drilling opportunities."

## Stórur áhugi fyri Anne Marie

SJEYNDI BRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

**Áhugin fyri sjeynda brunninum á føroyska landgrunninum er ovurhonds stórur bæði hjá myndugleikum og oljufeløgum. Sosialurin veit, at fleiri oljufeløg hava víst Anne Marie brunninum áhuga og okkurt teirra hevur enntá verið í samráðingum við ENI sum fyristøðufelag at sleppa uppí.**

**Nú Dana er vorðin fjórða felagið í brunninum er tó neyvan hugsandi, at pláss er til fleiri feløg. Tað er serstakliga góðu jarðfrøðiligu umstøðurnar í undirgrundini, sum hava vakt ans millum mong oljufeløg.**

**Jarðfrøðingar úr fleiri oljufeløgum Vinnan hevur tosað við halda, at júst Anne Marieleiðin goymir lykilin til at finna fyrstu føroysku oljuna. Áhugavert er eisini at bíta merki í, at ikki so langt frá hesi leiðini, finst eitt rakstrarverdugt fund á bretskum øki, Cambo, sum mong eygu eru vend móti í løtuni. Farið verður nevniliga undir at bora enn eina metingarbrunn har í næstum við boriskipinum Stena Carron, sum í løtuni borar á Rosebankleiðini. Keldur í oljuverðini halda, at hesin metingarbrunnurin helst fer at gera av, um Amerada Hess sum fyristøðufelag fer at taka avgerð um eina útbygging. Vert er eisini at merkja sær, at Cambo og Anne Marie fara at verða boraðir um nøkunlunda somu tíð. Helst verður Cambo nakað fyrr.**

# Avgerð skjótt takast um oljuútbygging við markið



*Stena Carron, sum er bygt til at bora brunnar á Atlantsmótinum, her eisini í føroyskum øki*

ROSEBANK-ÚTBYGGING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað eru ikki bert myndugleikar og oljuvinna í Bretlandi, sum bíða spent eftir úrslitinum av boring á Rosebankleiðini skamt frá føroyska markinum. Eisini í Føroyum verður fylgt við hesi spennandi boring, tí úrslitið av henni kann fáa óbeinleiðis týdning fyri leiting her eisini.

Rosebankfeltið varð funnið í 2004 og varð skrásett sum eitt rakstrarverdugt fund. Síðani eru fleiri metingarbrunnar boraðir og tíðliga í ár varð so farið undir at bora enn ein brunn við heimsins mest framkomna boriskipi, Stena Carron. Hesin er helst tann, sum skal geva grønt ljós til eina veruliga útbygging.

Sosialurin hevur spurt Chevron í Aberdeen, sum er fyristøðufelag fyri hesum loyvi, hvussu gongur við boringini. Simon Tait, pressutalsmaður hjá Cevron sigur, at tey koma at bora til endan av apríl og eftir tað verður støða tikin til, hvussu farast skal víðari og evnt. um ein stór útbygging skal fara fram. Hini feløgini, sum eru við í hesum loyvi, eru StatoilHydro, OMV og Dong. Somu feløg eru eisini við í einum loyvi, sum liggur beint hinumegin markið, also í føroyskum øki.

Føroyki oljumyndugleikar hava vónir um, at feløgini kanska fara at bora á okkara landgrunni í 2010 ella 2011, um so er, at alt gongur sum ætlað á Rosebankleiðini. Blaðið skilur, at tað er rættiliga sannlíkt, at Chevron og tess partnarar út frá tí vitan man hevur longu, fara at byggja út Rosebankleiðina.